miðvikan
Nr. 54 • 18. mars. 2009
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

## Vanlukkur í Suðuroy 1914-24:

# Elspa í Hovi misti tveir menn og fimm børn



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

**Hjá fólki í dag ber als ikki til at skilja hesi hóttafall, sum hendu fyrra partin av seinastu øld. Serliga tí er tað umráðandi, at hetta ikki verður gloymt. Ikki minst fyri tey ungu í dag, sum eiga at vita, at teirra vælferð ikki er ein sjálvfylgja**

**4. partur**

### Minnisvarðavígsla við kongi sum talara

Í 2. parti greiddi Sunneva Niclassen frá um minnisvarðan á Tvøroyri. Elin Mortensen, ættað av Tvøroyri, hevur í bók síni Heimbygd mín Tvøroyri skrivað um tíðina, sum henda greinarøð viðvíkir. Hon greiðir eisini frá minnisvarðanum í bygdini. Hon skrivar millum annað:

Tiltiknu vanlukkuárini 1920-1924 høvdu volt ómetaliga sorg og trega um alt Føroya land, einamest í Suðuroynni, har tríggjar sluppir av Tvøroyri gingu burtur, og eingin maður spurdist aftur.

Sorgin og neyðin hesi vanlukkuár var nívandi, samfelagið varð alt rakt. Hóast roynt varð at veita eina hjálpandi hond, var ikki gjørligt at bøta um sorgina og saknin. Men ikki skuldu hesi vanlukkuár gloymast. Heldur ikki teir, ið sjólótust í stríðnum fyri at lívbjarga sær og sínum. Nøvn teirra skuldu varðveitast og ærast, komandi ættarlið skuldi minnast teir. Ætlanin at seta teimum ein minnisvarða varð longu ein veruleiki í 1925, árið eftir, at General Gordon var farin.

Ein nevnd við monnum úr teimum ymisku bygdunum, sum høvdu mist sínar sjómenn, varð sett at fyrireika arbeiðið og at útvega pening til hetta endamál. Væl varð tikið ímóti, fólk vildu fegin stuðla, og sum frá leið, vóru savnaðar saman yvir 3.000 krónur. Hetta var nógvur peningur tá.

Eitt dømi um ein av teimum góðu stuðlunum var hovmeistarin á Tjaldrinum, danin Poschman, sum gav fruktkurvar, kransakøku, konfekt og ymiskt góðgæti til eina uppboðssølu fyri hetta endamál. Hann var kendur sum ein góður føroyavinur.

Leitað varð fyrst eftir einum hóskandi steini í Suðuroy. Men tá ið hetta ikki eydnaðist, varð farið norðureftir. Á Veðranesi var frálíkt grót til slíkt endamál. Bóndin á Selatrað, Óli Carl Petersen, kom sjálvur við út í hagan at leita. Teir funnu eisini rætta steinin.

Hannn varð førdur suður, og tá fór steinhøggarin Óli Arge, umrøddur her í blaðnum seinasta hósdag, til verka.

Jógvan Waagstein, lærari og listamálari í Havn, hevði gjørt uppskot til sjálvan minnisvarðan og til innskriftina.

Longu á vári 1926 var hetta stóra arbeiðið liðugt. Nú skuldi steinurin flytast niðan á Torvheygg. Her fór hann at síggjast væl bæði úr bygdini og av sjónum.

Steinurin var 3 metrar høgur og vigaði um 1,5 tons. Hann varð lyftur upp á ein vogn við hjólum, og hálvt hundrað mans fóru nú dragandi við honum eftir vegnum.

Hann var so settur upp av Johan Mortensen, hjá Dánjali, og Albin Åkesson.

### Kongur við til vígsluna

Minnisvarðin skuldi vígast sunnudagin 6. juni. Hendan dagin komu Kristian 10. og Alexandrina drotning til Tvøroyrar á síni Føroyaferð. Sólin skein frá morgunstundini, og dýrd var á vík og vág. Neyvan hevur verið størri fjøld á Tvøroyri, sum hendan dagin.

Tá ið kongshjúnini vóru komin saman á Torvheyggi, talaði Herluf Thomsen vegna fyrireikingarnevndina av flaggprýdda røðarapallinum. Hann heitti á øll um at varðveita hetta stað, at tað kundi liggja friðhalgað allar tíðir vígt minninum um allar teir sjómenn, ið sigldu út av Tvøroyra fjørði og ikki vunnu leiðina heim aftur.

Jovina Christiansen, ið hevði mist elsta son sín, Clæmint, átjan ára gamlan, við General Gordon avdúkaði minnisvarðan. Tað var ein kenslusom og hátíðarlig løta, tá ið svarta klæðið, ið hevði hult steinin, spakuliga varð tikið niðurfrá.

Á steininum var gyltur krossur høgdur í myrku basaltsúluna. Niðanfyri var akkersmynd, har innskriftin var sett rundan um, eisini við gyltum bókstavum: TEIR SJÓLÓTUST FYRI FØÐILANDIÐ.

Niðast á steininum var skriftorðið úr Johannesar Evangelium:

**Ingen har større Kærlighed end denne, at han sætter sit liv til for sine Venner.**

Í djúpu kvirruni, ið valdaði hesa løtu, vóru tað einstøk fólk, ið hoyrdu eitt løgið ljóð uppi í erva, eitt suð í loftinum, ein brúsan sum av veingjum. Tey hugdu upp men sóu einki. Fleiri hugsaðu, ar hetta mundi vera Guds einglar, ið sveimaðu uppi yvir.

Sungin varð sálmurin "Der er et særligt Glædens Hjem." Síðan talaði Gulak Jacobsen,



*Mynd: Føroya Fornminnisavn*

*Minnisvarðin á Tvøroyri, tá ið hann var nýggjur*



*Hov, henda lítla bygdin misti 17 mans á sjónum 1907-1920*